# Savna ruskposar sum jól

**Hesa vikuna hava tríggir av monnunum, sum savna inn ruskposar fyri brennistøðina hjá IRF á Hagaleiti, verið ílætnir sum jólamenn og hava givið børnum, teir hava møtt, karamellur. – Hóast vit hava brúkt einar 2-3 tímar av okkara frítíð hvønn dagin, hevur tað verið ógvuliga stuttligt at kunnað glett børnini, siga teir**



JÓLINI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Smá børn og stór eygu.

Tað hevur verið sjónin, sum fleiri ferðir hesa vikuna hevur møtt trimum monnum, sum savna ruskposar inn fyri IRF.

Av sínum eintingum hava teir keypt sær nissuklæði og hava útvegað sær karamellur frá handlum á leiðini, har teir svna ruskposar til at geva børnum.

Í morgun áttu børnini í norðrara parti av Eysturoy og í Sundalagnum eysturoyarmegin tørn.

Fyrr í vikuni hava ruskmenninir eisini verið í Vestmanna og í Vágum, men tann eina dagin tarnaði regnið teimum.

At vála í nissuklæðum í oysandi regni, er lættari sagt enn gjørt, men ein slíkan dag vitjaðu teir í staðin í barnagørðum við karamellum.

Teir, sum savna inn ruskposar, byrja stundisliga á morgni, og tí hava teir roynt at hugt væl eftir, um onkur í húsinum hevur verið uppi, tá ið teir hava verið fram við.

- Hava vit sæð onkran í vindeyganum – og børn hava verið í húsunum, hava tey vaksnu gjørt skjótt av og eru komin við børnunum, sum hava fingið karamellur frá okkum.

Teir tríggir, sum savna rusk í bilinum, ið verður róptur Ryski, eru úr Funningi, Haldórsvík og av Toftum.

- Hetta hevur verið ógvuliga stuttligt, og vit hava upplivað nógv saman við børnunum. Tað hevur verið stuttligt at sæð, hvussu ovfarin og glað børnini hava verið.

Rusk-menninir siga, at tað hevur tikið einar 2-3 tímar eyka hvønn dagin at koma runt í økjunum.

- Vit eru fastløntir, so hetta er farið burtur av okkara frítíð, men tað ger einki so stór, sum gleðir hjá okkum hevur verið at glett børnini.



*Jólamaður við ruskposa og karamellum til børnini*



*- Dagurin hevur verið einar 2-3 tímar longri, men hetta hava vit gleðiliga latið av okkara frítíð*